







Guðrun&Guðrun



Guðrun&Guðrun

**Mótabloggarar eru um at fáa eins stóran týdning sum mótajournalistarnir nú, tí mótabloggarinir verða sera nógv lisnir: Tað var ein ørgrynna av bloggarum á *Copenhagen Fashion Week*, og sera nógvir teirra hava viðmerkt showini hjá Barbaru í Gongini og Guðrun&Guðrun**

**Mótabloggurin style.dk skrivar soleiðis um Barbaru í Gongini:**

Við heili 45 ymsum sniðum vísti Barbara í gjárkvøldið sína A/W kollektión í Gallery-teltinum við Forum. Tað var einki nýskapandi – tað var tað vanliga myrka og androgyna konseptið við einum avantgardiskum profili og einum monokromun litvali – sum tó á ongan hátt skuffaði, men heldur tvørturímóti enn einaferð prógvaði hennara stórfingna talent og fantastiska stíl.

Morgunhár, galosjur, lastikk, flættað, tape, plast, ull, metal, leður, pelsur og bundið lýsir tað visuella málið í stylingini og evnisvalium. Av teimum 45 ferðunum modellirnar komu á pallin, vóru seks teirra harramodellir ...

**Mótabloggurin a fashion tale skrivar soleiðis um Barbaru í Gongini:**

Showið hjá Barbaru í Gongini var ótrúliga flott – ótrúliga avantgarde – men ótrúliga flott. Eg kann ikki koma í tankar um ein einasta, sum kann fara í eitt heilt Barbara í Gongini sett, men hon skapar altso nøkur ótrúliga góð ting. Mær dámdi serliga væl smálutirnar ...

**Mótabloggurin unlikely skrivaði soleiðis um Barbaru í Gongini:**

Í gjár var eg til showið hjá Barbaru í Gongini. Um eg var ummælari, og tað kann man vist kalla meg inni her, so hevði eg givið henni toppkarakter – myndirnar tosa nokk fyri seg. Serliga hárið og skógvarnir vóru fantastisk.

**Mótabloggurin The Bandits skrivar soleiðis um Barbaru í Gongini:**

Showið hjá Barbaru var rættiliga fantastiskt. Hennara tunga og gátuføra univers kom týðiliga fram bæði í kollektiónini og soleiðis, sum showið var gjørt.

A/W kollektiónin frá Gongini bjóðaði eina rúgvu av svørtum við einum dismi av beige, grovari bummull, leðri, bundnum og fleiri øðrum óvanligum evnum. Okkara høgu tankar um klæðini hjá Barbaru eru í øllum førum líka høgir eftir hesa fínu og einastandandi kollektiónina.



Barbara í Gongini

**Mótabloggurin Wartime recess skrivaði soleiðis um Barbaru í Gongini:**

A/W kollektiónin hjá Barbaru í Gongini er á onkran hátt ein blandingur av Gareth Pugh/ Damir Doma/ Junya Watanabe. Sýningin gleið væl við eini eyðkendari norðurlendskari orku, og eg eri freistað at siga, at mær dámdi hesa sýningina betur enn nakran av omanfyrinevndu sniðgevunum. Stylingin var einastandandi, androgyn og delikat; bleiku andlitini og dramatiska hárið stóðu væl til pløgg, sum sóu út til at skula setast saman við skrøddum nylonsokkum og nógvari attitudu. Pelsurin og skógvarnir við píkunum eru ósigiliga góðir!

**Mótabloggurin Jimi and Dolly skrivaði soleiðis um Barbaru í Gongini:**

Eg elski heimin hjá Barbaru í Gongini. Showið í gjár var einki minni enn rørandi. Eg fekk gásarhold av samanrenningini av klæðunum, stylingini og tónleikinum. Eg gleði meg at hyggja nærri at hesi kollektiónini á myndunum.

**Mótabloggurin style intuition skrivaði soleiðis um Guðrun&Guðrun:**

Føroysku Guðrun&Guðrun, sum nokk eru best kendar fyri bundu troyggjuna, sum Sara Lund er í í Forbrydelsen, høvdu show í Ráðhúsinum fríggjakvøldið. Aura legði fyri við at syngja eitt lag í eini hvítari Guðrun&Guðrun kreatión, og síðani var kollektiónin, sum í høvuðsheitum var bundin, sýnd fram.

Man merkti ein lítlan íblástur frá Rodarte, men tað var sanniliga eisini teirra egna fingramerki sett á við bindingini og mynstrunum. Og endiliga eitt show við harramodellum ...



Barbara í Gongini

**Mótabloggurin fashion-by-student skrivaði soleiðis um Guðrun&Guðrun:**

Sýningin byrjaði við einum sangi frá eini gentu í einum Guðrun&Guðrun kjóla. Eg bara elskaði tann svanakenda kjólan, sum sveimaði, hóast hann var evnaður úr ull. Fantastiskt. Og ein serstakliga góður máti at byrja eitt show uppá. Kjólin hevði eisini ketur á rygginum! Ein so ótrúliga óvanligur kjóli.

Guðrun&Guðrun høvdu annars klæði til menn og kvinnur, sum var kul. Eg vildi sagt, at tað eru framtíðarkend klæði, sum eru góð at vera í. Eg elskaði, at hóast tað var space-age og skulpturelt, sá tað ikki út til at vera keðiligt at vera í. Faktiskt øvugt.

*Til menn:* troyggjur, motorsúkklubuksur við bótum á knøunum, greftligar øklastylvar, nakað av leggings (men hetta vænti eg ikki fer at sláa ígjøgnum).

*Til kvinnur:* Minikjólar úr angora, norðurlendskir tendensir, bundin space-age, lokkanóts kápur (íblástur frá Rodarte), súkklubuksur og gamasjur – og fantastiskir cowboystylvar í svørtum og hvítum.



Guðrun&Guðrun

**Mótabloggurin The door in my wardrobe skrivaði soleiðis um Guðrun&Guðrun:**

Guðrun&Guðrun eru tvær kvinnur úr Føroyum, og tær gera undrunarverd hondbundin klæði, nøkur pløgg úr organiskum jersey og eisini skógvar. Tað er okkurt listarligt yvir teirra kollektión, og ja, onkur fer helst at draga paralellir til Rodarte nú. Men eg haldi ikki, at Rodarte kann taka alla æruna fyri hasa grovu bindingina, og Guðrun&Guðrun bróta frá Rodarte – og punkuta stílinum. Tað er okkurt einfalt, róligt og æstetiskt yvir teirra pløggum. Mohair verður tvinnað saman við leðri fyri at skapa mótsetningar, og stáltráður fær faldin á einum løttum mohair kjóla at sveima, sum eitt stívskjúrt. Mynstur og snið eru einføld, og ja, tær hava eisini onkrar festligar smálutir í teirra kollektión.